# Bilar

Nr. 68 • mikudagur • 5. apríl 2006 • 80. árgangur • www.sosialurin.fo

Bilasølan:

## Fimm nýggjar Mazda til Hertz




*Øssur Johannesen frá Bilasøluni (h.m.) handar Una Danielsen frá Hertz teir fimm nýggju Mazda3 uttan fyri nýggja Mazda-bygningin í Hoyvík*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Seinasta hósdag læt Bilasølan í Hoyvík fimm nýggjar bilar til Hertz-bilaleigu.

Talan var um fimm Mazda3 1,6 Touring, fýra sedan og ein hatchback.

Síðan 1999 hevur Hertz Føroyar leigað bilar út í samstarvi við altjóða fyritøkuna Hertz.

Uni Danielsen frá Hertz Føroyar sigur, at teir vanliga hava millum 25 og 30 leigubilar, hetta eru bilar av ymiskum sløgum, hvørs miðalaldur er beint oman fyri 1,5 ár. Krøvini frá Hertz er at leigu bilarnir ikki mugu gerast eldri enn 3 ár.

Tað eru nógv, ið ynskja at leiga egnan bil, tá hetta gevur góðar møguleikar at ferðast rættiliga frítt í landinum.

Ivan Johansen Bilar:

## Seks nýggjar Berlingo til býráðið




*Pauli Waag frá Ivan Johansen Bilum handar teir seks hvítu Citroën Berlingo til Eivind Danielsen, leiðara fyri húsaumsitingina hjá Tórshavnar Býráð. Húsavørðarnir standa við hvør sín bil. Uttast til vinstru er ein Ciroën Jumper, sum eisini hoyrir til húsaumsitingina*

Fríggjadagin læt bilasølan Ivan Johansen Bilar seks nýggjar Citrëen Berlingo til Tórshavnar Býráð.

Talan var um seks hvítar Berlingo 1,4 við bensinmotori, ið fyritøkan hevði bygt um til vørubilar.

Bilarnir hoyra til húsaumsitingina hjá Tórshavnar býráð til húsavørðarnar at koyra við.




**ELLISAKFAR TIL SØLU**
Volvo 144. 4 hurðar (grønur). Bilurin er skrásettur fyrstu ferð í 1971. Hevur bert havt tveir eigarar. Áhugaði eru vælkomin at venda sær til.
**Tel. 213727**

- **Umvæling av tryggingarskaðum og privat skaðum**
- **Vit umvæla øll bilmerki**
- **Klárgering til sýn**
- **Bremsur, útstoyt, stoytdoyvarar, rustarbeiði o.m.a.**



**Ring og fá eitt tilboð**

**Sp/f Plátuverkstaðið**
**Falkavegur · Tórshavn · Tel 321778 ella 221778**
**Teldupostur: plv@plv.fo**